Nr. 2 | mar. 2010 | 63. árið

# Kirkjuligt Missiónsblað

# Gud er kongur

Í Matt. 6,19-20 lesa vit: "Savnið tykkum ikki gripir á foldum, har sum mølur og rustur eta, og har sum tjóvar bróta inn og stjala; men savnið tykkum gripir í himli, har sum hvørki mølur ella rustur etur, og har sum tjóvar ikki bróta inn og stjala."

Guds ríki er eitt ríki, har Gud stýrir. Ríkið er ikki bert eitt andaligt men eisini eitt sjónligt ríki, har Gud er kongur.

Eg veit ikki, hvussu nógv vit hugsa um hetta í gerandisdegnum, at omanfyri øll heimsins ríkir, er eitt stórt, ævigt ríki, har Gud sjálvur er kongur og hevur alt vald, bæði í himli og á jørð.

Vit hava fingið rættiliga nógv at vita um hetta ríkið. Vit hava Bíbliuna, har vit læra Gud at kenna, har vit fáa at vita, at Gud í syni sínum, Jesusi Kristi, steig niður á jørðina sum frelsari heimsins. Hann fór aftur til himmals og kemur síðan aftur aðru ferð, tá verður dómur, og síðan skulu tey, sum tóku ímóti frelsuni, altíð verða saman við honum.

Eg veit ikki, hvussu nógv kongar og ríkisleiðarar hugsa um, at Gud er kongur yvir øllum kongum, og ríkisleiðari yvir øllum ríkisleiðarum, og tað er hann,sum hevur seinasta orðið. Men hetta hugsaði Dávid kongur nógv um. Vit kunnu taka tvey brot úr Sálmunum: "Tí høgur er Harrin, øgiligur, ein veldigur kongur yvir allari jørðini. Sálmur 47,3. og : "Kongadømi títt er kongadømi um allar ævir, og ríki títt varir ætt eftir ætt! Harrin er trúfastur í øllum orðum sínum og



miskunnsamur í øllum verkum sínum.Sálmur 145,13

Dávid veit, at hóast hann er kongur í Ísrael, so er ein nógv størri kongur yvir honum, og tað er Gud sjálvur.

Tann veruleikin, at Gud er kongur yvir øllum, kann ikki vikast. Menniskju kunnu seta seg upp ímóti Gudi, kunnu nokta at verða honum líðin, men Gud verður hóast tað framvegis kongur. Hann hevur lovað, at ein dag verður tað ógjørligt at seta seg upp ímóti hansara kongadømi, tá verður hansara kongadømi sjónligt fyri øllum, og eingin verður førur at standa ímóti. Tá verður eingin mótstøða, einki ólýdni, hansara vilji verður galdandi uttan mótsøgn.

Vald Guds kemur til sjóndar

Hugsa tær tann dagin tá ið vald Guds kemur til sjóndar. Jesaja profetur sær fram ímóti tí degi í Kap. 24-27. Tá ið eg lesi tað sum Jesaja skrivar,

so siti eg eftir við tí tanka, at hesin dagurin kann ikki verða langt burtur. Vit kunnu taka nøkur ørindi úr Jesaja 24: "Jørðin fánar og fúnar, heimurin følnar og fúnar, jarðarinnar heyggjar følna. Jørðin er vanhalgað undir fótum teirra, ið á henni búgva; tí at lógir hava teir brotið, vanmett fyriskipanir og slitið hin æviga sáttmálan. Tessvegna oyðir illbiðing jørðina, og tey, sum á henni búgva noyðast at bøta. Tessvegna farast íbúgvar jarðarinnar av hita, og fátt verður eftir av fólki."

Tað kemur ein dagur, tá ið Harrin ikki longur góðtekur, at menniskju gera uppreistur ímóti honum, og ikki vilja góðtaka hansara kongadømi. Hann ger tað, sum hann við profetunum hevur fráboðað, hann sessast sum kongur á Zions fjalli í Jerusalem, og Guds kongadømi kemur til sjóndar.

Men hesin dagurin er ikki bert ein dómadagur. Hann er fyrst og fremst ein gleðidagur. Jesaja heldur fram í 25,6: "Harri herliðanna man á hesum fjalli tilbúgva øllum tjóðum veitslu, veitslu við krásum og gomlum víni, veitslu við feitum krásum og gomlum skírum víni.

Hann skal á hesum fjalli taka burtur skýluna, sum hylur allar tjóðir, og slørið, sum liggur yvir øllum heidningafólkum.

Deyðan ger hann til einkis um allar ævir; og Harrrin dráttin skal turka tárini av hvørjum andliti og taka burtur vanvirðing fólks síns um alla jørðina, so satt sum Harrin hevur talað."

Tá ið profetarnir greiða frá tí stóru gleðini, so brúka teir ofta myndina við eini veitslu, har borðreitt verður við krásum og gomlum víni. Tað, sum liggur aftanfyri hesa myndina er, at teir brúka tað, sum fólk kenna, fyri at greiða frá tí tey ikki kenna, tað stórstu gleðina sum hugsast kundi, tá ið Gud skal ráða sum kongur og hansara kongaríki verður opinberað.

Hetta verður framtíðin. Lat okkum hava hetta í huga. Johannes sigur í sínum fyrsta brævi: "Elskaðu tit, hevur Gud soleiðis elska okkum, tá eiga vit eisini at elska hvør annan."

ANDAKT

## "Ikki tit hava útvalt meg; men eg havi útvalt tykkum..." Jóh 15,16

Mong týdningarmikil val eru í einum menniskjalívi. Men lívsins allarstørsta val hevur ein annar longu gjørt fyri teg!

Ja, tað er rætt, tí Jesus valdi okkum, áðrenn vit yvirhøvur vóru til: "... Gud útvaldi okkum í Kristi, áðrenn grundvøllur heimsins varð lagdur..." (Ef 1,4)

Hugsa tær: Jesus hevur tikið støðu fyri tær. Áðrenn tú yvirhøvur var til, valdi hann at líða og geva sítt lív fyri teg – fyri tína skuld! Altso eitt val, ið tú onga ávirkan hevði á!

At tú síðani hevur valt hann, bæði eina ferð og fleiri ferðir, ja, dagliga. Tað kann bara skiljast í hesum ljósi. Lat tað kasta ljós á títt kristnilív. Lat tað vera miðdepil í tínum lívi sum Guds barn: Ikki at tú hevur valt hann, men at hann hevur valt teg!

**Guds ríki er komið**

Tá Jesus kom, kom Guds ríki til jarðar. Men Jesus kom ikki til jarðar at vísa sítt vald. Nei, hann kom at seta seg í okkara støðu, at býta kor við okkum. Hann var gjørdur neyðarsligur líka til deyða á krossi. Hann kom at líða í okkara stað og harvið taka revsingina fyri okkara syndir.

Í veruleikanum sigrar Jesus á djevlinum við at lata verða við at brúka sítt vald. Hansara sigur gert veruleiki, við tað at hann ikki nýtir vald. Hann gongur ístaðin líðingarvegin.

Tá Jesus vísir sítt vald á henda hátt, er tað ikki lætt at síggja tað. Heldur ikki er tað altíð lætt at síggja Guds ríki. Tó at tað altíð er til staðar.

Í Luk. 17,20-21 lesa vit: " Men tá ið hann av Farisearunum varð spurdur um, nær Guds ríki mundi koma, svaraði hann teimum og segði: "Guds ríki kemur ikki soleiðis, at tey kunnu vísa á tað; ei heldur skulu tey kunna siga: Sí, her er tað! Ella: Har er tað! Tí sí Guds ríki er innan í tykkum. (Í norsku Bíbliuni stendur: "Guds rike er iblandt dere).

Tað er heilt greitt, at her verður tosað um eitt andaligt ríki. Í hesum førinum er helst umsetingin í norsku bíbliuni meira beinrakin – Guds rike er iblandt dere – tí Jesus talar her við farisearарnar, og teir trúðu ikki á Jesus. Jesus meinar her við, at tað er hann, sum er ímillum teirra. Tosaði hann við tey trúgvandi hevði hin týðingin veri rættari – Guds ríki er innan í tykkum. Tvs. at har sum Jesus er, har er Guds ríki. Hetta ríki kenna vit í trúnni á Jesus, og tí er tað ósjónligt.



**Guds ríki kemur aðru ferð**

Men ein dag skal Guds ríki verða sjónligt fyri øllum. Í Op. kap. 21 lesa vit: "Og eg sá nýggjan himmal og nýggja jørð, tí at hin fyrri himmalin og hin fyrra jørðin vóru horvin, og havið var ikki longur til.

Og eg sá staðin hin heilaga, hitt nýggja Jerusalem, stíga niður av himli frá Gudi, búnan sum brúður, ið var skrýdd fyri manni sínum.

Og eg hoyrdi harða reyst frá hásætinum, sum segði: "Sí, tjaldbúð Guds er hjá menniskjunum, og hann skal búgva hjá teimum, og tey skulu verða fólk hansara; og Gud sjálvur skal verða hjá teimum.

Og hann skal turka hvørt tár av eygum teirra, og deyðin skal ikki longur verða til, ikki heldur sorg, ikki heldur skríggj, ikki heldur pínsla skal longur verða til; tí at tað fyrra er farið.

Og tann, sum í hásætinum sat, segði: "Sí, eg geri allar lutir nýggjar!" Og hann sigur: "Skriva! Tí at hesi orð eru trúgv og sonn."

Hetta er tað, sum Guds børn hava í væntu. Lívið kann mangan verða trupult og dapurt, men ein dag verður alt tað myrka burtur, tá verður tjaldbúð Guds hjá menniskjunum, og Gud sjálvur skal verða hjá teimum í allar ævir.

Jákup á Dalinum

# Víngarðsmaðurin og víntræið

Um tú nú eisini hevur lært og sannroynt, liðið og gjørt nógv, men hetta, sum í Skriftini kallast ávøkstur, ikki er at finna í tínum lívi, tá svitast ikki: tú ert enn ikki komin inn í veruligt samband við Jesus. Men – um tú bert gongur inn undir dómin og leitar eftir hesum, so manglar jú bara, at tú lærir tín frelsara at kenna, fært at síggja, hvat ið tú eigur í honum og letur teg søkka djúpt niður í hansara kærleika – verður doyptur "við anda og eldi".

Um tú harafturímóti ert so sannførdur um, at tín kristindómur er sannur, at tú ikki vilt taka hann upp til eftirmetingar, hóast tú manglar hendan serliga ávøkst Andans, tá ert tú veruliga millum tær greinarnar, sum skulu takast burtur og – ræðuligur tanki – kastast í eldin og brennast. Harrin hevur sjálvur sagt tað.

Eru nú tær góðu greinarnar fullkomiliga reinar? Tær bera ávøkst Andans, kærleika fyrst og fremst – eru tær tá ikki reinar frá øllum, sum ónt er?

Nei. Jesus sigur nakað annað. *Eina og hvørja grein, sum ber ávøkst, reinsar hann, til tess at hon skal bera meiri ávøkst.* Altso eru hesar, sum Jesus kallar góðar, fruktberandi greinar, tó ikki fulkomiliga reinar í sær sjálvum.

Nógv kristin blanda í hesum sambandi tvey ting saman. Tey meina, at tað, at bera frukt, skuldi verið tað sama sum fullkomin reinleiki. Tað er tað nú ikki. Ein grein, sum í ríkum máti ber góða frukt, kann hava turrar kvistar, ella villskot, sum bara súgva kraft; hesi mugu burturbeinast. Soleiðis kann eisini ein kristin eiga eina livandi trúgv, vera ríkur ikki bara í kærleika, men í andans ávøksti sum heild, og samtíðis ikki bara hava lut í vanligari spillu, men eisini vera fastur í einum ella øðrum harmiligum, sum støðugt má krossfestast og drepast, men sum hann tó aldri verður heilt fríur av. Hóast tað, er hann eitt heilt annað slag av greinum, enn tær greinarnar, sum ikki bera ávøkst. Ofta kann eitt heilt vanligt heimsins menniskja hava nógv færri feilir og virka heilt øðrvísi tiltalandi. Men ikki minni er tað fulkomiliga deytt og uttan ávøkst.

Hóast tú soleiðis ikki ert fullkomiliga reinur, men dagliga mást líða undir tínum ófullkomileika og tíni synd, so hevur hesin tó ongan rætt til at fordøma teg, so leingi tú bara ert sameindur við tín frelsara. Og hóast tú aldri sjálvur verður nøgdur við ávøkstin, tú sært, so kanst tú tó ikki umgangast at merkja, at tú við hesi sameining við Jesus, hevur nakað av ávøkstinum, sum her er talað um. Ert tú sameindur við Kristus, so ert tú ein nýggjur skapningur, og tá skal – vit siga tað aftur – allur tín ófullkomileiki og allur tín óreinskapur ikki fordøma teg.

Tað er eingin, sum so av álvara merkir sína synd og sín óreinskap, sum júst tey mest trúgvu og sonnu kristnu. Men samtíðis, eru tey rein í Kristusi, hava góðan tokka hjá Guði og eru greinar á hinum sanna víntræinum, sum bera nógvan ávøkst.

Hvussu fer so hin himmalski víngarðsmaðurin við teimum greinunum, sum bera ávøkst?

Jesus sigur: " *eina og hvørja* grein*, sum ber ávøkst, reinsar hann, til tess at hon skal bera meiri ávøkst."*

Hann reinsar hana. Hin greinin harafturímóti, sum ikki ber frukt, fær loyvi til at passa seg sjálva. Hon skal jú bara brennast til seinast. Men hin, sum ber ávøkst, hon skal røktast. Hana reinsar hann.

Hvussu gongur tað fyri seg?

Hendan myndin, sum Jesus hevur valt, er ótrúliga lærurík. Tá ið urtagarðsmaðurin reinsar, verður tað ikki gjørt við vatni, men við einum skravijarni og knívi. Mosi og turrar greinar, óneyðugir kvistar og bløð, sum bara virka darvandi fyri evnini hjá greinini til at bera ávøkst, verða reinsað burtur.

Hetta samsvarar heilt við royndirnar hjá tí trúgvandi. Merkja vit ikki ofta knívin hjá urtagarðsmanninum? Merkja vit ikki, tá ið vit sita og hoyra Guðs orð, hvussu tað tvíeggjaða svørðið treingir inn í tað innasta

og altíð veit at raka júst við tað, har ið okkara eyma punkt er?

Somuleiðis, tá ið vit hava svikið, har sum Harrin hevur sett okkum, verið líkasæl og ólýðin – hvussu merkja vit tá ikki knívin aftur! Tað er tann umhugsni víngarðsmaðurin, sum, tá ið hann vætir í víngarðinum, syrgir fyri, at vit ikki ein dag fáa loyvi til at vera nøgd við okkum sjálvi. Støðugt ljóðar í okkara innaru Andans revsandi tala. *"Sjálvt um nætur meg minna míni nýru."* sigur Dávid. Har, sum Heilagi Andin býr, kann tað ómøguligt vera øðrvísi. Tí at tað er ómøguligt, at *hann* ikki skuldi funnið nakað hjá okkum, sum var óreint – og líka so ómøguligt, at hann ikki skuldi átalað hetta. Og um hesin orðsins og Andans agi ikki røkkur, so roynir hin trúfasti Harrin við útvortis plágum og revsing, sorgum og mótgangi, i tann mun, hann sær tað neyðugt.

Stutt sagt: Eitt Himmalsins barn skal reinsast. Ápostulin sigur: "*Tí at Harrin agar tann, sum hann elskar, og hann slær harðliga hvønn tann son, sum hann tekur at sær. Men eru tit uttan aga, sum allir hava fingið lut í, tá eru tit trælbornir, og eru ikki synir. - - Allur agi tykist væl í stundini ikki at vera til gleði, heldur til sorgar; men aftaná gevur hann afturfyri teimum, sum við honum eru spekt, friðsælan ávøkst í rættvísi.* Hebr. 12.

Tað er ikki av hjarta, hann pínir og plágar menniskjunnar børn. Málið er at fáa ávøkstin fram. Tann greinin, sum ber ávøkst, sigur Jesus, hana reinsar hann, *fyri at hon skal bera meira ávøkst*. Og Guð havi lov! Vit síggja nú eisini dømir um, at agin júst hevur hesa ávirkan.

Vit hava helst øll sæð ein ella annan, annars sannan og upplýstan kristnan, sum vit tó við sorg sóu ein vissan dovinskap og andaliga ófrukt hjá. Tá verður hann heilt óvæntað raktur antin av sorg ella ólukku ella einum stórum sálarstríði. Og tá ið hann aftur kemur út úr hesum reinsandi ovninum, er hann heilt ein annar enn fyrr, merktur av nógv størri álvara og nógv ríkari í góðum gerningum.

Og hvussu ofta hava vit ikki gjørt hesa sannroynd – vit, sum standa undir Harrans umsjón og røkt – at tá ið girnd, hugmóð, sjálvsøkni ella líknandi fingu meiri enn vanligt vald á okkara sinni, so vardi ikki leingi, fyrr enn vit blivu rakt av einum ella øðrum, sum fekk okkum inn aftur á kós. Tá ið so Harrin aftur hevur troystað okkara hjarta, kenna vit okkum, sum eftir eitt gott heitt bað, og byrja við nýggjum treysti at renna hansara vegir.

Tey, sum eru vorðin kend við hesa Faðirsins trúføstu, agandi hond, vilja til seinast sjálvi duga at siga tað áðrenn, tá ið agi er á veg. So avgerðandi er tað, at tær góðu greinarnar verða reinsaðar. Við vandlátni vakir Harrin yvir teimum sálunum, hann fyrireikar til himmalin. Hann vil, at tær skulu gerast reinari og reinari og ríkar av ávøksti. Hinar fáa loyvi til at liva, sum tær hava hug til. Í síðsta kapitli í bíbliuni sigur Harrin: *Tann, sum ger órætt, haldi fram við at gera órætt, og hin óreini haldi fram við óreinsku síni, og hin rættvísi haldi fram við rættferð síni, og hin heilagi haldi fram við halgan síni!*

Hendan reinsanin er altso eitt eyðkenni – eitt ógvuliga týdningarmikið eyðkenni á teimum greinunum, sum bera ávøkst. Og tá serliga tann innara reinsanin, agi Andans í hjartanum. Útvortis royndir kann eisini tann gudleysi uppliva. Men hendan Andans innara aga, har ið ófullkomileiki og vanar støðugt vera átalaðir, og ein tí aldri verður nøgdur við seg sjálvan, men støðugt má oysa av evangeliinum til troyst fyri sína sál – tað er eitt so sermerkt eyðkenni hjá teimum trúgvandi, at hóast tey fyri berum manglum ofta ikki kunnu síggja nakran ávøkst hjá sær sjálvum, so er hesin agin einsamallur eitt tekin um, at tey eru av teimum greinunum, sum Harrin tekur sær av.

Mátti Harrans Andi fingið loyvi til at festa í okkara hjørtu, tað sum Harrin her hevur sagt okkum, so at tey trúgvandi við tí kunnu verða styrkt í vissuni um, at tey standa í hesi sælu sameining við frelsaran, og tey, sum standa uttanfyri, ikki fáa frið, fyrr enn eisini tey eru komin inn í ta sonnu støðuna til hansara og eru byrjað at bera ávøkst í tí týdninginum, sum Skriftin lýsir okkum. Tá skulu vit – hóast alla okkara óreinsku – vera rein fyri hansara eygum.

C. O. Rosenius

Dan Eliassen týddi.

# Mennesker på vores vej: EDINA



Lenah er den eneste kvindelige evangeliststuderende i sin klasse. Hendes mand er præst og tager sig af deres større børn hjemme i landsbyen. Men den yngste søn, Yoshua, har hun hos sig. Sidste skoleår blev den lille dreng passet af Edina, når Lenah var til undervisning.

Det forekom mig at Edina var for ung til at have afsluttet sin skolegang. Så jeg spurgte ind til hendes forhold. Det viste sig at hun havde forladt folkeskolen i utide. Hun kunne ikke holde ud at gå i skole på grund af grov sexchikane fra en lærers side.

Peter og jeg drøftede hendes situation og fandt ud af at der her i nærheden var en eftermiddagsskole for unge og voksne, som var droppet ud af grundskolen. Her blev hun meldt ind og vi fik købt skoleuniform, sko, bøger og diverse skriveredskaber til hende.



Hun var lykkelig for at kunne fortsætte sin skolegang om eftermiddagen, når Lenah var færdig med sine timer. Og hun kom ofte og viste os sine gode resultater fra prøverne og lærernes fine anmærkninger om hendes arbejdsindsats.

Sexchikane i Tanzanias skoler er desværre et stort problem. Bed om at vi må få visdom til at se, hvordan vi bedst kan gøre noget ved det.

Anne-Lene Midjord Olofson

# Heykljómari og munkur

Í heyst var eg við til at seta sendarar á fuglar í Sumba. Hetta var ein partur av einari uppgávu hjá einum lívfrøðilesandi í Keypmannahavn. Vit vildu kanna, hvussu fuglar klára at finna veg. Vit fangaðu fuglar í Sumba og fingu eini 30 fuglar sendandi úr Danmark. Vit vildu kanna, um hesir fuglar dugdu at finna aftur á rætta kós, nú teir vóru endaðir her í Føroyum. Fuglurin, tit síggja á myndini, er ein heykljómari. Hann eigur vanliga í Eysturevropa og Asia og er í vetrarvist í Eysturafrika. Men summir fuglar fara av kós, tá teir skulu flúgva í vetrarvist og enda í Føroyum. Við at seta sendarar á fuglarnar, kundu vit kanna, um teir vistu av hesum. Vistu teir, at nú er heilt galið? Dugdu teir at síggja, at Sumba ikki er Eysturafrika? Nú má eg venda við og fara suðureftir? Vit settu sendarar á 5 heykljómarar, og teir fóru allir í ein beinan vestan ella í ein útnyrðing. Hetta eru stórir og sterkir ljómarar, og flestu teirra fóru avstað úr Sumba, hóast teir høvdu mótvind. Og fara teir í ein beinan vestan úr Sumba, so enda teir í Grønlandi ella New Foundlandi. Men ongin heykljómari er mær vitandi skrásettur í Amerika, so tað er næstan heilt vist, at teir doyggja á vegnum yvir um hav. Teir eru so sterkir og líta á seg sjálvan og hugsa ikki: Eri eg nú farin av kós?

Á sama hátt eiga vit at steðga á og spyrja: Eri eg farin av kós? Gangi eg á tí breiða vegnum? Fari eg eina ásetta kós, tí eg føli tað er rætt, líka sum instinktið hjá heykljómaranum sigur, at hann skal fara? Guds orð skal verða ein lykt fyri okkara føtur. Jesus eigur at vera vitin, sum vit ferðast eftir. Hann er vegurin, sum vit eiga at ganga eftir. Vit eiga ikki at líta á okkara styrki og kenslur.

Munkurin er í somu ætt sum heykljómarin, men er minni og veikari. Vit settu eisini sendarar á munkar í Sumba og tað vísti seg



skjótt, at flestu munkarnir fóru í ein landsynning, tá teir fóru úr Sumba. Teir vóru greiðir yvir, at teir vóru farnir av kós og máttu venda við. Munkar eiga í Skandinavia og teir síggjast sum oftast hjá okkum um heystarnar, tá hann hevur verið eystan ella landsynningur. Fuglarnir vita, at teir skulu í ein sunnan, men tá vindur kemur á teir, so fara teir ofta við vindinum. Teir orka ikki at berjast móti vindinum og enda her hjá okkum. So steðga teir á, leita sær føði og fara so suðureftir, tá veðrið er til vildar. Hetta kann læra okkum, at hóast vit eru komin av leið, so kunnu vit venda um til Jesus og leita okkum styrki hjá honum. So kunnu vit fáa kraft til at byrja av nýggjum – sjálvt um vit hava eitt heilt hav, sum vit skulu flúgva um.



# Frelstur gjøgnum 2. Mósebók

Fimm tær fyrstu bøkurnar í Bíbliuni eru nú týddar til turkmenisk. Tær eru 1. - 5. Mósebók. Úr Turkmenistan hava vit fingið henda vitnisburð, sum sigur okkum, hvat ið hendi, tá ið ein ungur maður fór undir at lesa 2. Mósebók á sínum móðurmáli. Av tí at tey kristnu í landinum javnt og samt verða hótt og forfylgd, hava vit orðað henda vitnisburð soleiðis, at eingin skal kenna persónarnar aftur. Og her kemur so vitnisburðurin:

Síðstu viku vitjaði ein ungur turkmeniskur muslimur heim mítt. Vit fóru inn í stovuna at práta. Á borðinum lá barnabíblian hjá dóttur míni. Bíblian lá opin, og hesin ungi maðurin sá beint niður á eina mynd av Mósesi, sum klývur Reyðahavið sundur í tvey.

"Hó, eg kenni hasa søguna," segði hann.

Júst tann morgunin hevði eg lisið í Mósebókunum, sum eru týddar til turkmenisk og givnar út í einari bók, so hon lá undir liðini á barnabíbliuni á borðinum. Eg segði: "Lat meg vísa tær søguna." Eg læt 2. Mósebók á turkmeniskum upp og spurdi hann, um hann dugdi at lesa hetta.



## Hon talar til mítt hjarta og mína sál

Hann var skelkaður, av tí at bókin var á turkmeniskum. Hann svaraði: "Ja, wow, eg dugi at lesa hana." Í fyrstuni las hann stamandi, og hann segði: "Eg havi ikki lisið í 10 ár." Hann helt á at lesa, og eg sá, at hann brádliga skilti tað, hann las. Hann las nøkur fá reglubrot í senn og kundi so siga okkurt, so sum: "Wow, Gud verjir Ísrael. Eg skilji hetta. Hetta er á mínum máli!"

Hann helt á at lesa, og tá ið hann hevði lisið í umleið ein tíma, steðgaði hann á og segði: "Genta mín plagdi at lesa Bíbliuna á russiskum; men so frætti hon, at tú kundi enda í fongsli, og tí gavst hon. Men nú, tá ið eg sjálvur eri førur fyri at lesa í henni, skilji eg betur, hví hon hevði slíkan áhuga í hesi bók. Hetta er tann mest áhugaverda bókin, eg havi lisið í. Henda bókin er á mínum máli, og hon talar til hjarta mítt og sál mína. Eg fái ikki nóg mikið av henni."

Tá ið hesin ungi maður kom til endan á søguni um Móses, sum gekk gjøgnum Reyðahavið, segði eg honum, at hann kanska var ein av teimum fáu, sum nakrantíð hevði lisið í hesi bók á sínum móðurmáli. Hann gjørdist skelkaður og svaraði: "Okkum er tørvur á, at øll fáa atgongd til hesa bók."

## Hann fall á knæ

Eg segði honum, at tað var neyðugt, at hann las eitt sindur fremst í hesi søguni, fyri at tað skuldi geva meining, og eg blaðaði aftur til søguna um páskamáltíðina. Hann las

stykkið um páskalambið og um deyðans eingil, sum gekk fram við teimum húsum, har blóðið var smurt á durastólparnar. Tá ið hann las tað, segði hann: "Hetta boðar okkum um Jesus. Hetta talar um hansara offur fyri meg, so at eg ikki skuldi doyggja! Hann læt seg knúsa og gav blóð sítt, so eg kundi liva!"

Tað var stuttligt at síggja, hvussu Guds heilaga orð arbeiddi í hjarta hansara. Eg hugdi upp á hann og segði: "Ja, hatta er ein mynd av Jesusi og hansara offur fyri teg."

Orðini raktu hann hart, og tár komu í eygu hansara, og hann hevði gásarhold um allan kroppin. So reistist hann, segði farvæl og rann út. Tey næstu fýra kvøldini kom hann inn á gólvið, og hvørt kvøld segði hann: "Eg orki ikki at bíða, eg má koma aftur nú at lesa meir í teirri heilagu bókini á mínum máli."

Tá ið vikan var at enda komin, fall hesin ungi maður niður á síni knø og tók ímóti Jesusi Kristi sum sínum Harra og Frelsara.

Takk fyri tykkara strævna arbeiði at týða Mósebøkurnar til turkmensk. Tykkara arbeiði er ikki nyttuleyst.

Effie Campbell umsetti.



# Nýtt frá KMF

## Nýggjur stýrislimur

Stýrið í KMF hevur fingið nýggjan lim. Silas K.K. Olofson er komin við í stýrið. Formaður er Justinus Poulsen og hinir limirnir eru Jóhan Henriksen, Sigurd Sørensen, Kristian Thorleifsson.

## Stuðul til Tanzania

Umframt fastan stuðul hevur KMF stuðla Anne-Lene og Peter Olofson við 20.000 kr. Hetta eru pengar, sum skulu nýtast til fyrifallandi endamál. T.d. koma fólk av og á og biðja hjálp til at keypa heilivág eller brillur, tí tey ikki hava ráð. Men nakað av peningi skal eisini nýtast til bibliuskúlan, har tey arbeiða, so næmingarnir fáa betri kor. Takk fyri allar gávur til KMF, sum ger tað møguligt at stuðla missiónsarbeiðinum úti og heima.

# Armóðstankar ella kongaligur prestaskapur



Jesus sigur: "Eg eri vegurin og sannleikin og lívið. Eingin kemur til faðirin uttan við mær." Jóh. 14,6. Jesus er sannleikin, og um eg ikki tosi samsvarandi Guds orði, so veit eg, hvør ið hevur víkiskylduna, so tað ikki verður samanstoytur.

Summi trúgvandi halda seg vera so fátøk og ørm. "Á, eg føli meg so neyðarsligan og vesalligan," kunnu tey siga. "Eg dugi einki og kann einki. Kanst tú ikki biðja fyri mær?"

"Nei," plagi eg at siga, "eg biði ikki fyri tær!"

"Ha?" spyrja tey undrandi og vilja neyvan trúgva sínum egnu oyrum.

"Nei," svari eg, "tí tað, sum tú hevur gjørt, er, at tú hevur sett tínar kenslur, tíni følilsi, fram um Guds orð. Tað er sum at seta hestavognin framman fyri rossið, og tað nyttar einki. Sum trúgvandi er Bíblian tín kontobók. Tú hevur **lisið ov lítið** í henni. Tú veitst jú ikki, hvat ið stendur inni á kontoini. Tú ert longu vælsignað við allari himmalsins signing. Lurta nú: "Lovaður veri Gud og faðir várs Harra Jesu Krists, sum **hevur vælsignað okkum við allari andligari signing á himnagrundum** í Kristi." Ef. 1,3. Set Guds orð framman fyri tínar kenslur. Tá setir tú sannleikan í hásæti, og tá lovar Jesus, at sannleikin skal fría teg og seta teg í frælsi frá øllum slíkum armóðstankum. Hoyr: "... og tit skulu læra at kenna sannleikan, og **sannleikin skal fría tykkum**." Jóh. 8,32.

Klóki maðurin gróv djúpt, til hann kom niður á klettin. Tá nústani fór hann undir at byggja síni lívshús. Tað kann vera nokk so strævið at grava niður gjøgnum allan sandin, áðrenn tú kemur niður á klettin; men tað loysir seg. Sandgrundin er alt tað "yvirfladiska", tað grunnskygda, kenslur, tankar og tílíkt. Okkara klettur er Kristus, lesa vit í 1. Kor. 10,4, og Kristus er Guds orð. (Jóh. 1,1) Tað vil við øðrum orðum siga, at um tú ætlar, at tíni lívshús skulu verða standandi, tá ið ódnirnar herja, so mást tú byggja á klettin Kristus, tú mást lesa hansara orð og fylla teg við orði hansara. Tá grevur tú niður á klettin, tú grevur niður ígjøgnum sandin, sum er tankalívið, kenslurnar og umstøðurnar.

"Eg føli meg sum eitt dust, eitt údsaligt, sum einki kann," siga nógv. Tvætl í teg! Norðmenn hava eitt ørindi, sum ljóðar so: "Føleri - følera, da faller du snart ifra." Gevst við at byggja á kenslur og følilsi, tí so fellur tú skjótt frá. Bygg á Guds orð. Hvat stendur har? "Tit eru ein **útvald slekt, ein kongaligur prestaskapur, ein heilag tjóð**..." (1. Pæt. 2,9) "Ja, men eg føli meg ikki útvaldan ella serliga heilagan," sigur tú kanska. Nei, men um tú hevur bjóðað Jesusi inn í títt hjarta, so ert tú heilag, tí hann hevur goldið tína syndarokning á krossinum.

Effie Campell týddi

# Fá tað skrivligt

**Lag: Lít allar tínar leiðir.**

**el.: Sig mær ta gomlu søgu.**

1.
Hvussu kann eg nú vita,
at syndin strikað er,
at Jesus meg nú frelsir,
at leið mót himni ber.
Spyr ei títt gamla hjarta,
so svikaligt tað er,
men les í Harrans orði
og fá tað skrivligt her.

2.
Tí kenslurnar tær skifta
frá gráti og til song,
frá sól til vetrarmyrkur,
tá fellur tíðin long.
Men Harrans orð og lyfti
tey broytast kunnu ei,
og kenslur ei ávirka
tað skrivliga, á nei.

3.
Tá stormarnir teir herja
og raka skipið meint,
hin ónda røddin ljóðar:
“Tú kemur ei á beint!”
Men eitt hann ikki sigur,
tað heldur løgið er:
“Í bátinum er Jesus,”
tað skriftin boð mær ber.

4.
Mín frelsugrund er ikki
mín trúgv, mín kærleiki,
umvendingin og bønir,
ei lívsins dýrdleiki.
Nei, grundin er mín Kristus,
Guds sonar sáttargerð,
og einki annað frelsir,
tað skriftin boð mær ber.

5.
Tá einaferð vit møta
vár Gud og Frelsara,
vit íðin skulu vitna
í landi sigranna:
“Vit aldri høvdu vunnið,
nei, tað er púra vist,
um ikki frelsan skrivligt
varð boðað oss við Krist.”

Ókendur/ E. Campbell umsetti.



# Guð flutti fjallið

Li stríddi seg niðan ígjøgnum ta longu brekkuna, turkaði sveittan av og suffaði. Tað kendist sum um, at hann ikki kom úr stað. Hann var so móður, tveitti taskuna frá sær og legði seg niður á bøin. Skúlavegurin var so langur, hann mest sum misunti hinum dreingjunum í flokkinum, tí teir búðu á missiónsskúlanum, meðan hann mátti ganga bæði í skúla og heimaftur og onkran dagin eisini tvær ferðir. Foreldur hansara høvdu ikki ráð at gjalda tað, sum tað kostaði at búgva á missiónsskúlanum.

Vegurin til skúlan hevði ikki verið so langur og strævin, um ikki hatta fjallið hevði staðið fyri. Honum dámdi so væl at ganga í skúla og at gera sítt heimaarbeiði, men tá ið hann altíð skuldi stríðast niðan á hatta fjallið í øllum hitanum, so var hann sera móður, tá ið hann kom í skúla um morgunin, og eisini tá ið hann kom heim aftur seinnapartin.

Hann reistist aftur, troyttur, tystur og í ringum hýri. Illur hugdi hann eftir fjallinum, sum stóð har og sperraði honum vegin í skúla. Oftari hann hugdi  hægri og hægri tyktist fjallið at verða, og hann hugsaði við sær sjálvum, at um hann hevði átt spreingievni, so roknaði hann við, at hann langt síðani hevði  sprongt fjallið í luftina.

Men knappliga kom hann at hugsa um bíbliuørindi, har tað stendur: “ Um tit hava trúgv sum eitt sinnopskorn, tá kunnu tit siga við hetta fjallið: “Flyt teg hiðani og hagar,” og tað skal tað flyta seg, og einki skal vera ógjørligt hjá tykkum.” Hann vendi sær móti fjallinum og segði við harðari rødd:” Flyt teg fjall!”, men so bleiv hann líkbleikur av ótta, tí um tað nú hendi, hvat so? Óivað, eitt ræðuligt buldur og so ............ Hann bakkaði fyrst eitt sindur og stardi eftir fjallinum. Men til alla lukku flutti tað seg ikki. Tað lætnaði, men kortini var hann skuffaður. Hevði Guð lumpað hann? Tí tað stóð so týðiliga í Bíbliuni. Men hann mátti skunda sær, so frægt sum hann kundi, tí hann var sera móður.

Nakað seinni fór Li upp til skrivstovuna hjá leiðaranum á missiónaskúlanum, sum var prestur, og bankaði uppá. Presturin læt hurðina upp og bað hann koma inn og seta seg niður. Li tók Bíbliuna og blaðaði upp á Matt.17,20. Síðani spurdi hann prestin, um tað, sum stóð har var satt. Presturin játtaði, tí sum hann segði, so var hatta Guðs orð, og Guð lýgur ikki. Síðani segði Li honum frá fjallinum, sum stóð í vegin, hvønn dag hann skuldi í skúla og spurdi prestin, um tað mundi nytta nakað at biðja Guð um at flyta fjallið. Jú, tað helt presturin, tí hann visti um hægri fjøll enn hatta, sum vóru flutt við Guðs hjálp.

Tríggjar mánaðir seinni bankaði Li so aftur á hurðina hjá prestinum. Nú vildi presturin vita, hvat Li hevði upp á hjarta. Jú, Li helt, at hatta ørindið í Bíbliuni kortini ikki skuldi skiljast bókstavliga, tí nú hevði hann biðið í tríggjar mánaðir, og enn hevði fjallið ikki flutt seg. Presturin bað Li hava tol og halda á við at biðja, tí hann var vísur í, at hann fór at fáa bønarsvar.

Ein dagin kom umsjónarmaðurin á vitjan á missiónsskúlanum fyri at vita, hvussu ið stóð til á missiónsstøðini, og hann var væl nøgdur við arbeiði, sum var gjørt. Áðrenn hann fór avstað, segði hann við leiðsluna á skúlanum, at hann hevði fingið tað soleiðis, at hann skuldi geva onkrum næmingi, sum trongdi til tað, 200 krónur, men hann visti ikki, hvør tað skuldi vera. Tá segði leiðarin beinanvegin, at hann helt, at Li skuldi fáa pengarnar, tí at hann var tann raskasti av næmingunum, men eisini tann fátækasti, og tað var bara hann, sum ikki hevði ráð at búgva á skúlanum. Hini vóru samd við honum, og avgjørt var, at Li skuldi fáa pengarnar.

Presturin fór so inn í skúlastovuna hjá Li, og Li var júst í holt við at koyra bøkurnar í taskuna. Tá presturin segði honum, at fjallið hevði flutt seg, gjørdist Li líkbleikur og fekk ikki sagt eitt orð. Presturin segði honum so, at hann hevði fingið pengar frá umsjónarmanninum, og at hann tí slapp at búgva á skúlanum og ikki longur noyddist at ganga til og frá skúla hvønn dag. Nú skilti Li, hvat tað var, sum presturin meinti við, tá ið hann segði, at fjallið hevði flutt seg. Li legði so aftrat, at so hevur Guð gjørt meira enn tað, sum eg bað um, tí hann hevur ikki bara flutt fjallið, men nú sleppi eg eisini frá at ganga teinin, sum enn hevði verið eftir, um fjallið ikki var har. Takksamir løgdu teir báðir seg á knæ í skúlastovuni og takkaðu Guði fyri bønarsvarið.

**Nýggir haldarar**

Eg ynski at halda “Kirkjuligt Missiónsblað”.

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Postnr. og bygd/býur: ____________________

Undirskrift: ____________________

*At senda til:*

Kirkjuligt Missiónsblað, Undir Klakki 39, FO-700 Klaksvík

# BARNASÍÐAN

# Ferðin gjøgnum oyðimørkina

**(framhald)**

Ferðin út úr Egyptalandi byrjaði í Ra´amesis og á vegnum steðgaði fólkið í Sukkot, Etam, Pi Hakirot, Sjursoyðimørkini og í Mara. Síðani gekk leiðin til Elim. Har hvíldi fólkið seg, fekk nóg mikið til matna og sløkti tostan. Orðið Elim merkir pálmi, og har vóru 70 pálmar og 12 keldur av vatni.

Alt fólkið var úthvílt og væl fyri, tá ið tey hildu leiðina fram úr Elim suðureftir fram við Reyðahavinum. Men longur tey komu inn í Sinsoyðimørkina, kargari gjørdist umstøðurnar, og maturin, sum tey høvdu tikið við sær, var um at verða uppi. Tá byrjaði fólkini aftur at gremja seg um, at tey aldri skuldu verið farin út úr Egyptalandi, tí har fingu tey, ið hvussu so er mat og drekka.

Móses vendi sær í síni neyð til Guðs, og um kvøldið lá eitt tjúkt lag av vælsmakkandi fuglum á staðnum, har fólkið hevði sett tjøldini. Dagin eftir sendi Gud fyri fyrstu ferð manna av himni, og síðani fall manna niður hvønn morgun øll 40 árini, ið ísraelsfólk ferðaðist í oyðimørkini. Tey fóru út um morgunin eftir manna, og tað nyttaði ikki at leggja inn undir seg til nógvar dagar, tí tað rotnaði. Men dagin fyri sabbatsdagin skuldu tey taka til tveir dagar, tí onki skuldi verða gjørt sabbatsdagin. Tá fólkið fyri fyrstu ferð sá manna fella niður av himni, spurdu tey bilsin, hvat hetta var, men kortini ótu tey tað, gjørdust mett, og manna helt teimum á lívi í umleið 40 ár.

Manna er eisini ein mynd upp á Guðs orð. Guðs børn standa eins og ísraelsfólk ofta spyrjandi og skilja kanska ikki alt, sum stendur í Bíbliuni, men mugu kortini sanna, at tað er týdningarmikið at lesa og hoyra Guðs orð, tí at tað er við orðinum, at tey fáa styrki at verða verandi Guðs børn.

# BARNASÍÐAN

**Í orðagátuna hesaferð skulu tit seta støðini, sum ísraelsfólk eru steðgað við, higartil á ferðini, men eisini tvey av teimum komandi støðunum, Refidim og Sinaj**

## Orðagáta



# Loysn




*Umbróting:*
*Brandur Petersen*

*Prent:*
*Estra*

*Ábyrgd:*
*Silas K.K. Olofson*

*Útgevari:*
*Kirkjuliga Missiónsfelagið*
*Undir Klakki 39*
*FO-700 Klaksvík*
*Tlf.:* *286968*
*T-postur:* *kmf@kmf.fo*
*Heimasíða:* *www.kmf.fo*
*Konta:* *9181-495.337.3*

*Kirkjuligt Missiónsblað kemur út 8 ferðir um árið*
*( feb, mar, mai, jun, aug, sep, nov, og des)*

*Haldaragjald:* *kr. 150,-*